# Pedagogar

Søkt verður eftir 1 pedagogi at arbeiða 34 tímar um vikuna, á stovu við børnum í aldrinum 6/7 ár, at byrja 1. februar 2004.

Dr. Margrethu Barnagarður er normeraður til 94 børn í aldrinum 0 til 7 ár sum eru bólkaði soleiðis:

1 vøggustova á 10 børn í aldrinum 0 til 3 ár
3 barnagarðsstovur á 21 børn í aldrinum 3 til 5 / 6 ár
1 forskúlastova á 21 børn í aldrinum 6 / 7 ár

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er, at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

**Tann í settur verður, skal hava :**
- Góð samstarvsevnir
- Vera kreativ/ur
- Kunna arbeiða sjálvsstøðugt
- Duga at síggja tørvin hjá tí einstaka baninum
- Hava ábyrgdarkenslu

Vit vanta at tú saman við okkum skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag, lønarstig 10.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Umsóknir saman við avritum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 23. januar 2004.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Marjun Lassen á tlf. 455557 lokal 10.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
Gerðagøta
FO-700 Klaksvík

# Goymslumaður/ Húsavørður

Søkt verður eftir røskum manni at arbeiða á Hjalla. Tann, ið settur verður, kemur at hava ábyrgdina av goymsluni inni og eisini á plássinum uttanfyri.

Á innanduragoymsluni eru m.a. smærri amboð, eykalutir, el-lutir. Uttandura eru størri amboð, formar, jarn, v.m.

Goymslumaðurin skal vera røkin, duga at viðlíkahalda smáamboð og arbeiða sjálvstøðugt.

Hevur hetta tín áhuga, vinarliga send eina skrivliga umsókn til

**P/F J & K Petersen,**
á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf. 315060 · Fax 314194
e-mail: jkp@jkp.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Kunngerð

## um løgtingsval í Fuglafjarðar kommunu

Til veljarar til løgtingsvalið 20. januar 2004 í Fuglafjarðar kommunu.

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at atkvøðugreiðslan fer fram í **býráðssalinum** týsdagin 20. januar 2004 fyri Fuglafjørð og Kambsdal og í húsunum hjá **Annu Jensen** fyri Hellurnar.

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan støðg.

Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til og við fríggjadag millum kl. 10.00 og 15.00.

Tey, ið vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima við at venda sær til býráðsskrivstovuna á telefon 444006 innan kl. 15.00 tann 19. januar 2004.

Seinasti dagur fyri at greiða brævatkvøðu er **mánadagur tann 19. januar 2004**.

Fuglafjørður, tann 5. januar 2004
**Fuglafjarðar býráð**

# Norðoya Javnaðarfelag

hevur

**opið hús við Klaksvíksvegin 6**

Mánakvøldið 12.01 til hóskvøldið 15.01 frá kl. 20.00.
Fríggjakvøldið 16.01. aftaná valfundin.
Sunnukvøldið 18.01. og mánakvøldið 19.01 frá kl. 20.00.
Valdagin 20.01 er opið frá kl. 10.00.

**Hugnakvøld**
Leygarkvøldið 17.01 kl. 20.00 verður hugnakvøld í Bøgøtu 3.

**Norðoya Javnaðarfelag, tlf. 459900**

# Frá Sandoyar sýslu Javnaðarfelag

## Hugnakvøldið

ið skuldi verða á Sandi 29. november, verður ístaðin leygardagin 10. januar kl. 19.30 á Keldu í Skálavík við røðum, sangi, tónleiki og góðum mati.

Øll javnaðaráhugað eru vælkomin.

**Nevndin**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 476, P/F O. C. Joensen, 450 Oyri.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík (formaður)
**Innkomin sum formaður:** Ólav Sune Marius Fløtt, 470 Eiði
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Sofus Poulsen, Aggusteinsvegur 1, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 6. januar 2004*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3496, P/F O. C. Trol, 450 Oyri.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík (formaður)
**Innkomin sum formaður:** Ólav Sune Marius Fløtt, 470 Eiði
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Sofus Poulsen, Aggusteinsvegur 1, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 6. januar 2004*

*Kristin Balle*










veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Koyrikort?

Nýggj teoriskeið byrja **mánadagin 12. januar**
kl. 17.30 til persónbil
kl. 19.30 til lastbil, trailara og buss
og **týsdagin 13. januar**
kl. 19.30 til motorsúkklu

**FØRARASETRIÐ**
KOYRISKÚLI

| | |
|---|---|
| **John A. Christiansen** koyrilærari tel 21 47 75 | **Stanley A. Olsen** koyrilærari tel 21 10 99 |

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

# Tann Føroyski Hárfríðkanarskúlin

Dámar tær væl at fáast við hár ella smyrsl
- so er hettar kanska nakað fyri teg.

Skúlin tekur bara 2 ár.
Tú er vælkomin at senda eina umsókn sum skjótast.



TANN FØROYSKI HÁRFRÍÐKANARSKÚLIN
Postboks 1047 · FO-110 Tórshavn
Tel 314768 · Tel 311683 eftir kl. 20.00

Føstu almennu býráðsfundirnir hjá Klaksvíkar Býráð fyri ár 2004 verða hesir:

| | |
|---|---|
| 27. januar | 22. juni |
| 24. februar | 21. september |
| 16. mars | 19. oktober |
| 20. apríl | 16. november |
| 18. mai | 14. desember |

**Klaksvíkar býráð**

# Lastbilur til sølu

Volvo FL 14 v/ kassa bíliga til sølu.

**Tlf. 228063**



# KOM OG SYNG VIÐ!!

**Leygarkvøldið 10. januar 2004 klokkan 19.00, skipar yngra kvartettin í Betesda Klaksvík fyri evangeliskari sangløtu í**

## MENTANARHÚSINUM Í FUGLAFIRÐI

**Á skránni er:** Felagssangur
Kvartettsangur
Filmbrot, drama
Tala

**Ókeypis atgongd - Aftaná verður bjóðað til kaffi**

**ØLL eru hjartaliga vælkomin**

*Smakkið, og síggið, at HARRIN er góður! Sælur er tann maður, ið søkir sær skjól hjá Honum.*

***Sálmur 34,9***

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til umboðsmannaval í Gøtu 9. februar 2004, fyri bygdirnar í Gøtu kommunu.

4 umboð skulu vera vald, uppskot um minst 6 valevni skulu vera sjúkrakassanum í hendi innan 24. januar 2004.

Eisini verður lýst til umboðsmannaval fyri bygdirnar Hellurnar og Oyndarfjørð 10. februar 2004.

2 umboð skulu vera vald, uppskot um minst 3 valevni skulu vera sjúkrakassanum í hendi innan 24. januar 2004.

**Sjúkrakassi Fuglafjarðar Læknadømis**

Føroyingar, staddir í Danmark á valdegnum, kunnu greiða brævatkvøðu við at venda sær til

**Føroysku Sendistovuna**
Strandgade 91
1401 København K

ella til fólkayvirlitið, har tey eru stødd.

Sjúklingar og onnur, ið ikki sjálvi kunnu koma á staðið at atkvøða, verða biðin um at venda sær til Føroysku Sendistovuna á tlf. 3283 3770.

# Almennir kommunustýrisfundir

## hjá Sands kommunu 2004

Fundirnir verða allir mánadagar kl. 18.00.

Fundirnir í árinum eru settir at vera hesar dagar.

| | |
|---|---|
| 26. januar | 23. februar |
| 29. mars | 26. apríl |
| 24. mai | 28. juni |
| 26. juli | 30. august |
| 27. september | 25. oktober |
| 29. november | 13. desember |

Freistin fyri at fáa mál við á dagsskrá er, at tey eru kommunuskrivstovuni í hendi 1 viku undan fundardegi.

Skráin verður lýst í »svørtu-talvu« á skrivstovuni 4 dagar undan fundi.

Eykafundir ella broytingar til omanfyrinevndu, verða lýstir í »svørtu-talvu«.